# Niels Pauli Holm

* 19. september 1911. † 10. desember 1966.



Hendi seg ofta í skýmingini, tá ið eg fór inn at tendra akkersvitarnar á Tvøroyri, at í túninum hjá Kristiani á Hólum gekk ein tættvaksin, frísutur drongur — nakað eldri enn eg — og sparkaði bólt. Hann gekk í skúlaflokkinum yvir mær, og eg visti, tey høvdu nógv at gera til dagin eftir. Danski yvirlærarin, sum fingið hevði á stovn *Tverå kommunale folke- og realskole* og tí legði doyin á, at næmingarnir til próvtøku skuldu skara framúr, man vera harðligasti lærarin, eg havi møtt — serliga móti teimum, sum ilt høvdu við at fylgja við í skúlanum, so óførur lærari hann annars var hjá teimum gávaðu børnunum. »Sparkar tú bólt, Niels Pauli — skalt tú ikki rokna til í morgin?« Svarið var altíð tað sama: »Je eri langt síðani liðugur!«

Hann var altíð tíðliga liðugur — eisini við at liva. Longu 10. desember 1966 hoknaði hann niður av heilabløðing í viðtaluhøli sínum á Lands-

sjúkrahúsinum mitt undir arbeiðinum í báðum serlæknagreinum sínum — einasti lækni í Norðurlondum, sum dugdi báðar. Fáar tímar seinri andaðist hann, bara 55 ára gamal. Missurin hjá tí viðkvæma og fámenta føroyska heilsuverkinum var óbøtiligur. Og skiltu fólk tað ikki tá, munnu tey skilja tað nú. Enn er ikki vunnið á hesum sakni og verður tað ikki í bræði. Her kemur ongantíð *ein* maður aftur í mans stað. Í minsta lagi verða teir tveir.

Niels Pauli kom sum óviti mitt í einum skúlaári upp á Tvøroyri at ganga í skúla og varð hildin vera sibbi. Á lærarafundi varð skotið upp, at hann av illum skuldi sleppa at royna seg í lægri flokki. Tá helt faðir mín, sum var gamalur og vandur roknilærari, fyri: »Steðgið nú eitt sindur, drongurin kann ikki duga tað, ið hann hevur ikki lært. Býttur er hann ikki — eg havi hann í rokning.« Og rætt fekk hann. Niels Pauli slapp at halda fram, og komandi royndina var hann nógv tann besti í flokkinum. Og síðani var hann altíð millum teir bestu og hartil skjótur. Læknaprógv tók hann hálvt ár, áðrenn vanlig lestrartíð var lokin, hóast hann ofta hevði annað arbeiði framíhjá. Hann var næmur sum fáur. Las ikki nógv uppá, men ansaði altíð væl eftir at vera hjá í øllum tímum og til allar fyrilestrar, sum hann aldri misrøkti. Tí hann mintist so óføra væl tað, ið hann hevði hoyrt. Og hann hevði tann stóra fyrimun, at alt, ið bar við rokning, støddfrøði, alis-, evna- og lívfrøði, var honum so sjálvsagt, at tú ta tíðina, onnur sótu og stríddust við bøkurnar, kundi finna hann á leikvøllum, á kappróðrarbáti ella strúkandi langar leiðir á tí gamla lasafarinum av eini súkklu, hann var mestsum fastgrógvin við. Og hann dugdi so væl at finna sær kenningar og vinir, altíð millum teir mest dugandi — eitt, ið serkendi hann alt lívið í útlegd. Hann krókaði seg ikki burtur ella firnaðist fólk, sum føroyskir studentar ofta høvdu lyndi til. Men tók av fullum huga lut í danska studentslívinum inni á Garði. Hin fróasti millum teir fróu, men ongantíð gjørdi hann ov nógv av brennivíni. Tí altíð var okkurt, hann hevði sett sær fyri at útinna dagin eftir.

Loysir seg ikki at leingja henda minnisstubba við dagfestingum, próvtøkum og útbúgvingarstørvum. Tey eru til skjals í læknaskráum. Miðvís og drúgv var útbúgving hansara, altíð við tí stavnhaldi at koma heim aftur til einsamallur at taka upp á seg tað, sum allar aðrastaðni tveir serlæknar vóru um. Liðugur í oyrna-, nasa- og hálssjúkum var hann 35 ára gamal, í eygnasjúkum 38 ára gamal og kom beinan vegin heim aftur í 1949 — aftan á 21 ára útlegd — har hann fekk starv á Landssjúkrahúsinum, síðan 1961 sum yvirlækni. Og umframt tók hann upp á seg eitt slítandi arbeiði í báðum hesum serlæknagreinum við 2 reisur um árið at ferðast út í hvørt læknadømi í landinum, dragsandi við sær tey tungu serlæknatólini, so høgligari skuldi vera hjá sjúklingum at hitta hann.

Blaðungur fekk Niels Pauli áhuga fyri politikki. Ikki so nógv føroyskum heimapolitikki, har hann — sum í øllum øðrum førum, tá ið á

stóð — var bundin at veruleikanum, men fyri heimspolitikkinum mikla, og tá mest fyri teimum sosialistisku rørslunum eystanfyri. Fáur maður yvirhøvur mundi fylgja so væl við tí, sum fyrifórst í teimum sosialistisku londunum, halda so nógv bløð og tíðarrit, lesa so nógv um royndirnar, ið gjørdar vóru, og gleðast so nógv uppi yvir tí velduga framburði og framgongd, sum henda stýrisskipan bar hesum stuttkomnu londum og knógvaðu fólkum, ið har búðu. Hann dugdi ikki at halda sær undir krígnum í tí hersetta Danmark, men kom so fyri, at hann í 1943 noyddist at flýggja til Svøríkis. Hesi bæði árini til krígslok góvu honum ein víðari sjónarring og vinarsamband við frægar læknar har, sum kom at verða honum sjálvum og øðrum at gagni seinri í lívinum. Yvirhøvur var eitt eyðkenni hansara tað, at hann ferðaðist nógv í útlondum í frítíð síni og altíð har vitjaði læknar og sjúkrahús og hevði altíð heim við sær okkurt at greiða starvsfeløgum frá.

Altíð var hann til dystin fús at kjakast um politisk evni, ofta til tann ljósa morgun. Mær ógloymandi eru løturnar, vit ofta høvdu saman, tá ið vit hittust á fundum, í veitslum ella heima við hús hvør hjá øðrum — Niels Pauli og gamli lærari okkara P. M. Dam, løgmaður, sáli. Altíð ósamdir onkursvegna, annaðhvørt allir tríggir ella skiftandi tveir móti einum. Men altíð í skemti, opinskáraðir og langt burtur frá tí pátikna, tilgjørda og varisliga, sum tíverri eyðkennir medferðina hjá flestu fólkum her á landi, tá ið prátið nærkast politiskum spurningum og trúarspurningum. Hann sá fyri sær, hvussu teir ódyrkaðu føroysku fjalladalarnir kundu fingist »til gróðrarbúnar teigar«, og hvussu framleiðslan av mjólk og sláturdjórum kundi vaksið, høvdu vit — staðin fyri ta hertænastu, flest lond hava — latið ungdómin, bæði gentur og dreingir, arbeitt eitt ár fyri tað land, sum vit hálova í veitslurøðum og syngja um úr Songbók Føroya Fólks, tá ið passaligt av løgi er farið niður um hálsvølin. Tí alt slíkt var fyri honum bara reyp og gabb, og fyri slíkum hevði hann bara tað spýggjandi vaml. Okkurt mundi hann sagt, hevði hann vitað aftur í verðina í dag og sæð, hvussu vesturlendskur ungdómur tykist at mistaka anarkismu fyri kommunismu. Eitt fyribrigdi, sum heldur ikki er ókent her á landi — tíverri. Mundi tað ikki vera í slíkari samrøðu við gamla løgmann, at Niels Pauli fyrstu ferð bar fram tankan um hægri lestur í Føroyum burturav? Hví ikki lata ungdóm okkara lesa her heima, so langt ráðini rukku, og nóg kønir lærarar fingust?

Men skrivandi maður var hann ikki. Onkur hevði longu í skúlanum á Tvøroyri trúttað niður í hann, at hann nyttaði einki við penninum. Og hetta kom alt lívið hjá hesum manni, sum annars fírdi fyri ongum, at gerast ein undirlutakensla, hann aldri slapp frá. Tað píndi hann, at hann fekk ikki málið at sita og kendi tað sum rættiligan klepp, tí har var so mangt, ið hann hevði hug til at festa á blað. Ofta hevði hann fyri munni, at tvímælta skúlagongdin í barnaárunum helst var atvoldin í øllum hesum.

Hann vónaði, at føroyskt mál mátti fara at liva og mennast á *øllum økjum*. Og mundi tað ikki vera tí — nú hann eftir okkara viðurskiftum var vorðin múgvandi maður — at hann stillfarandi royndi at styðja føroyskan fólkalestur. Frá 1955, og til hann doyði, var hann nevndarformaður í *Pf. Lestri*, sum gav út *Gluggan*. Ikki er ov nógv avgjørt at siga, at hetta frálíka blað doyði við honum, hóast tað andi enn nøkur ár. Tí hann var maðurin, sum ikki bara prátaði um og játtaði at gera nakað, men avrikaði tað beinan vegin. Alt tað, sum eingin annnar tímdi at gera á eini blaðfyritøku, gjørdi hann, ágrýtin og orðhaldin í hesum sum í øllum øðrum.

Hann vildi upp í *Fróðskaparfelagið* — ikki til at tykjast, men til at veita eina hjálpandi hond, serliga á tí øki, sum átti allan huga hansara: at fáa sum mest av vísindaligum bókmentum til Føroya. Tí noyddi hann seg sjálvan at skriva stutta grein til Fróðskaparrit 4. bók, 1955, um eina avbera sjáldsama, viðfødda eygnasjúku, hann hevði verið varugur við her í Føroyum. Men longu frammanundan — og øll árini, til hann doyði — bygdi hann sjálvur annar (saman við Arnbjørni Mortensen, rektara) upp stóra bókabýti felagsins við vísindastovnar um allan heim og helt skil á øllum hesum — eitt arbeiði, sum lønt fólk nú gera.

Sama gjørdi hann á Landssjúkrahúsinum, har hann øll árini skipaði fyri læknafundum og -skeiðum, ofta við serfrøðingum uttanlendis sum røðarum, sýndi fram læntar ella leigaðar kykmyndir um nýggjar viðgerðarhættir o. s. frv. Hann sat í sjúkrahússtýrinum og tosaði har ótroyttiliga fyri at flyta komandi stórbyggingina til eitt heilt annað stað. Hevði hann vunnið, hevði Landssjúkrahúsið ikki sum nú ligið sum eitt húsaskorð í býnum. Men vit aðrir mettu, at skuldi byggingin yvirhøvur koma á gongd, var neyðugt at boyggja seg fyri fyrisitingini. Helst mettu vit skeivt.

Rættiliga fólkaeydnu mundi Niels Pauli ikki hava, ið hvussu er ikki tey fyrstu árini. Hann hevði strítt seg fram til at koma heim aftur. Men eins og gomlu egyptisku læknarnir gjørdi hann ta roynd, at tað útlendska smyrslið er altíð tað besta! Tey (og tað vóru helst tey flestu), sum høvdu hoyrt, at hann var »kommunistur«, høvdu ilt við at skilja, at hann fyri arbeiði sítt skuldi krevja so nógvan pening. Men eisini har var støða hansara greið. Hann var ikki mannavinur á vanligan smikursøtan hátt: So leingi samfelagið, hann livdi í, varð fyrisitið á ein hátt, sum ikki var sambæriligur hugsjónum hansara, kravdi hann eisini í fullan mun tey rættindi, sum hetta samfelag segði seg at verja og styðja.

Tí mundi hann eisini vera besti formaðurin, ið føroyska læknafelagið nakrantíð hevur havt (1956—64, síðani næstformaður, til hann doyði). Hann var ikki snúðigur, men treiskur og óvikandi sum fjallið. Við honum í formanssætinum og við tingingarborð vunnu føroyskir læknar fyri fyrstu ferð somu lønarrættindi sum læknar í hinum pørtunum av ríkinum. Allar stoytirnar frá sáttmálaleysa tíðarskeiðinum 1962—63 fekk hann yvir sín kropp.

Læt hann við seg koma? Ongum segði hann nakað, ið hvussu er. Tí hann var ein harður hálsur. Tað gav at bíta tann seinrapartin við sjaskveðri av landsynningi, hann einsamallur á tíggjumannafari sínum, bara við yngsta soninum aftrat sær innanborða, fór suður at vitja sjúka pápan. Hóast pápin, ið var gamal skipari, bønaði hann ikki at fara avstað aftur, legði hann í náttarmyrkri aftur á Suðuroyarfjørð — tá var rættiligt illveður — vestan fyri Sandoynna, mátti liggja og bíða fyri útendunum, rak út í streingin á Borðuni og mundi ikki borið boð í bý. Sjey tímar hevði hann norður. Og alt varð gjørt, tí at eingin skuldi bíða eftir honum á Landssjúkrahúsinum morgunin eftir. Ella tá ið hann so javnan, innikavaður í Hoyvík, kom oman á Landssjúkrahúsið á morgni, akandi á skíðum.

Altíð legði hann nógv fyri seg, hóast hann í mong ár — sum enntá næstingar hansara einki vistu um — var deyðsjúkur maður. Hann bar tað aldri upp á mál. Eitt kvøldið, vit prátaðu saman um sjúklingar, og samrøðan kom inn á deyðan, glapp mær av munni (og eg kundi læst tenninar í tunguna,tá ið eg hoyrdi meg sjálvan siga tað): »Hvussu hevði tú kent tað, visti tú, at tú vart deyður um eitt ár?« Svarið kom beinan vegin: »Tykur verða skjótir aftan á mjeg!« So varð ikki sagt meira um tað.

Men kendi tú hann frá barnaárum og var kanska næsti vinur hansara, so visti tú eisini um alt tað sára og viðkvæma, sum í honum búði. Gleðina yvir at vera sloppin heim aftur aftan á langa útlegd í longsli og vónum. At sleppa at tevja nýslignan hógv, roykin av tara og rotnum kræklingi niðri í fjøruni, hoyra heiðafuglin láta uttan fyri húsini í Hoyvík og síggja pollamjørkan koma rekandi summarskvøld niðan gjøgnum Nólsoyarfjørð. Ella síggja og hoyra hann práta við heimaseyðin. Um slíkt tosaði Niels Pauli ikki við fólk. Tað var bara onkuntíð, tá ið vit spákaðu tveireinir úti í haganum ella róku á báti við snøri og byrsu. Á, ja — minnini eru mong um mann, sum var spæli- og leikbróður, ungdóms- og manndómsvinur og ein hin næsti og dyggasti starvsbróðurin, tú hevur átt.

Hansara reinlyndi, hansara andliga reinføri man hóast alt vera vakrasta minni, vit goyma um hann. Hann, ið sum fáur dugdi og tordi at siga hugsan sína bart út og beint upp í eyguni á fólki, bæði høgum og lágum, hoyrdi tú aldri siga eitt ilt orð um tann, sum var ikki hjá. Heldur tvørturímóti. Hann var tá altíð við tí góða orðinum. Og øll duga at skilja, hvussu stórur missurin var í so máta fyri arbeiðsveðurlagið á tí stóra sjúkrahúsi, har hann hevði sína dagligu gongd.

At siga einki skrivligt liggur eftir hann. Hann var eitt av hesum fólkunum, sum, meðan tey eru á lívi, eru — sum tikið verður til í Halgubók — salt jarðarinnar. Tað livir og grør rundan um tey. Men tá ið tey falla, verður tómt, og tað kulsar.

Og nú, eg havi skrivað hesar minnisreglur, kenni eg meg at hava framt eitt lítið brotsverk og at hava svikið mín deyða vin. Tí ein av teimum

mongu og fjølbroyttu eginleikunum, sum her vóru sama manni í kjøti bornir, var andstygd hansara fyri rósi og almennari umrøðu. Slíkt beyð honum altíð ímóti.

*H. D. Joensen.*